# HEILSANIR



**Til silvurbrúðarpari ð Olsen**
Hjartaliga tillukku við teimum 25 árunum og vóna at tit fáa 25 góð ár afturat. Havi nú ein góðan dag. Elska tykkum.
**Heilsan vit við Kirkjar**



Hjartaliga tillukku við degnum 8., 28. og 30. mai. Gud signi tykkum.
**Bestu heilsanir Kathrina við familju**



**Góða mamma og kona**
Hjartaliga tillukku við degnum 28. mai.
**Ynskja Høgni, Bjørt, Sveinur og Olaf**


**TIL SØLU**
Dantax DVD/CD/Mp3 v/fjarstýring kr. 300,00.
Rystipussari kr: 150,00.
Elektrisk geringsag kr. 400,00.
Skrivstovustólur v/gaspatrón kr. 350,00.
Melissa Hitblásari kr: 200,00.
*Tlf. 210039*

**10 VHS FILMAR**
við rock-bólkinum Queen til sølu, t.d.: Live inRio, Line in Budapest, Rare Live, Tribute Consert…
Samlaður prísur: 500,- kr.
*Tlf. 583295*

**EG SÓKNIST**
eftir einum sangi – Blot en kort liten stund varer striden.
*Tlf. 316765*

**ÚTHURÐ TIL SØLU**
stødd 215x95, vinstra inn. 1.000,- kr.
*Tlf. 316451*

**FOTOTÓL TIL SØLU**
Samsung Fototól, Digimax 410, 4Mega Pixels, 3xOptical- og 2xDigital zoom 256Mb CompactFlash memory kort. Battarí og ladari, USB kábil. Upptekur video klip, 10 til 30 sek. Við ljóð.1600 kr.
*Tlf. 314587*

**EYDNUHJÓL VIÐ GJÓGV**
Bygdarfelagið Gjáar Samkomuhús skipar fyri eydnuhjóli við Gjógv 21. august 2005. Tey, ið ynskja at stuðla tiltakinum, kunnu venda sær til nevndina:
Kristian Jákup Joensen, tlf. 423325
Jóhanna Vang, tlf. 421269
og Sofus Johannesen, tlf. 216586


# TILTØK

**Gudstænastur Hóskvøldið 2. juni**
*Sambýlið í Bøgøtu:* kl. 19.30 Elsa Funding

**Gudstænastur 2. sunnudag e. Trinitatis**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen. ***Talvan gongur fyri arbeiðið hjá Bíbliu-felagnum í Føroyum.***
*Argja kirkja:* kl. 11, Bergur D. Joensen. ***Talvan gongur fyri arbeiðið hjá Bíbliufelagnum í Føroyum.***
*Øravík:* kl. 12, Jónsvein Bech
*Gøta:* kl. 11 (altarg.,) Martin R. Jacobsen
*Oyndarfjørður:* kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Hvalvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Haldarsvík:* kl. 11,
*Tjørnuvík:* kl. 12, Mogens Tilsted Christensen
*Fuglafjørður:* kl. 11, altarg., Uni Næs
*Christianskirkjan:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen, útvarpað.
*Haraldssund:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Leiti:* kl. 11,
*Porkeri:* kl. 12, Patrick de Neergaard

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Bøn fyri Føroyum og øðrum tjóðum.
Í morgin kl. 6 Morgunbøn, kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael.
Hósdagin kl. 17 Bøn fyri samkomuni.
Fríggjadagin kl. 6 Morgunbøn, kl. 20 Ungdómsmøti v/ Margret Olsen.
Leygardagin kl. 14 Samkomudagur í Ítróttarhøllini á Nabb.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Sámuel Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC. Evnið: »At vitna í dagligdegnum« 2. partur v/ Ólavi Guttesen, kl. 22 Útimøti á Vaglinum. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Uppi á Brekku 3*
Mikumorgun kl. 7 Bøn.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12 tilbiðjanarmøti. Barnaansing er undir møtinum.
Sunnudagsskúlin kl. 12.
Týskvøldið kl. 20 samlast húsbólkarnir.
www.livdin.fo

**Meinigheitshúsið**
Týsdagin kl. 20 Bíbliutími, Rómv. kap. 9, 19-33.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti, »bøn« við Jógvan Højgaard.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, 20 ára hátíðarhald.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Leygardagin kl. 12 Brúðarvígsla.
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18 Evangel. møti.
www.gospel.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20 møtast vit í húsbólkum. Nærri fæst at vita á tlf. 315226. Einki møti verður í Hebron hetta kvøldið. Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samtundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 Møti, har Klæmint Eliasen úr Fuglafirði talar.
www.hebron.fo

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 Undirvísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 19 Ungdómsmøti hjá Jacobinu og Dagfinn.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Jan Jacobsen.
Sunnukvøldið kl. 17 Møti við Jastrid Høj. Sangur við Eyðun Jacobsen. Barnamøti kl. 17. (Aftaná verður náttturði, øll taka við). www.keldan.fo

**Siloa, Fuglafjørður**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Rodmundur í Liða talar. Evnið:1. Bræv Jóhannesar kap. 1. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími, Rómv. 14. kap. Øll eru vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagur 30. mai:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, dart og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491.
**Tilmelding til túrin til Kirkjubøar mikudagin 1. juni tlf. 316491.**
*Týsdagur 31. mai:*
kl. 10-11.30 Sangur – Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Kunning um mammugrafi, Marius Rasmussen
*Mikudagur 1. juni:*
kl. 10-12 Vit gera døgurða
kl. 12 Døgurði
kl. 14 **Útferð til Kirkjubø.** Sverri Patursson sigur frá
*Hósdagur 2. juni:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagur 3. juni:*
kl. 10-14 Fyrireiking til mentanarnáttina.
**Mentanarnáttin:**
**Litir og lutir renna millum runnar. Tilhaldið skipar fyri søluframsýning í Grasagarði 3. juni kl. 14-20.**

**Drekka og køka verður til keyps.**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl.- 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mánadagin 30. mai:***
Spæla ymisk spøl.
***Mikudagin 1. juni:***
Hoyra søgu.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
***Mánadagur 30. mai***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Aftaná drekka verður burturluting
***Týsdagur 31. mai***
Boccia
***Mikudagin 1. juni***
Prát og sangur. Vit spæla landastrok

***Hósdagur 2. juni***
Vit seyma taskurnar lidnar
***Fríggjadagur 3. juni***
Opið hús

***9. juni er ætlanin at fara útferð vestur í Vágar. Vit fara við bussi kl. 10, koyra til Sandavágs kirkju, har Heini F. Petersen sigur frá um kirkjuna og um Rúnarsteinin. Fara til Bíggjar har vit eta døgurða í Pakkhúsinum og fáa frágreiðing um húsið. Fara til Gásadals. Frásøgumaður verður við. Tilmelding innan 3. juni.***

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

## Brúdleyp

Leygardagin 4. juni kl. 12.00 giftast í Evangeliihúsinum Rigmor Skála Jacobsen, Tórshavn og Jon Fonsdal, Vestmanna. Veitslan verður á Hotel Hafnia fyir innbodnum.

Leygardagin 4. juni giftast í Aalborg Rådhus Rannvá í Nesinum Olsen av Argjum og Kent Bytten, úr Aalborg. Veitsla fyri innbodnum verður á Vegavej 78, 9200 Aalborg SV.

Leygardagin 11. juni kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Teresa Magnusen úr Lamba og Magnus Djurhuus Joensen av Nesi. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 17.00 og opið hús kl. 20.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Leygardagin 25. juni kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Margreth Olsen, Argir og Hildibrandur Olsen, Tórshavn. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 210756/210755 áðrenn 10. juni.

Leygardagin 2. juli giftast í Christianskirkjuni Dania Ragnarsson og Terji Poulsen, bæði úr Klaksvík. Døgurðin verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í Skálanum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 319125, 455950 ella 275180 áðrenn 18. juni.

Leygardagin 2. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Anna Petersen og Christian Danielsen, Tórshavn, (ættað úr Húsavík). Veitslan verður í B36-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 312265, 594670 ella 250232 áðrenn 20. juni.

Leygardagin 9. juli kl. 15.00 giftast Jens Pauli Hansen og Joan Andreasen í Christianskirkjuni í Klaksvík. Veitslan verður á Hotel Norð á Viðareiði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 222258, 215297 ella 224473 áðrenn 25. juni.

Leygardagin 16. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Hanna Bisp úr Havn og Mikael Johannsson frá Gråsten. Vælkomst verður í Pálsstovu í Havn kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 312335 ella 224220 áðrenn tann 16. juni.

## Silvurbrúdleyp

14. juni kunnu hjúnini Anna Petra og Karlon Winther í Havn halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 19. juni, við buffet í Róðrarneystinum á Argjum. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 213777, 310332 ella 361357.

5. juli kunnu hjúnini Joan og Tage Jørgensen, Sørvágur, halda silvurbrúdleyp. Veitslan verður í Sørvágs Bio 9. juli kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið, verða biðin um at ringja tlf. 266018, 332326 ella 333663 áðrenn 1. juli.